Flogbóltur – hagtøl:

Úrslit og støður:

Meistaradeildin kvinnur:

Úrslit

Mjølnir B–Mjølnir A	0-3 (10-15) (2-15) (1-15)
Fleyr–TB	3-0 (15- 5) (15- 9) (15- 3)
Mjølnir A–Fleyr	0-3 (15-17) (1-15) (9-15)
Mjølnir B–Dráttur	0-3 (4-15) (5-15) (4-15)

Støðan

	Dystir	Vunnið	Tapt	Settmunur	Stig
Fleyr	4	3	1	9- 3	6
Mjølnir A (FM)	4	3	1	9- 6	6
Dráttur	4	2	2	8- 6	4
TB	4	2	2	8- 7	4
Mjølnir B (U)	4	0	4	0–12	0

Meistaradeildin menn:

Úrslit

SÍ–Fram	0-3 (5-15) (5-15) (10-15)
Mjølnir 2–Mjølnir 1	0-3 (7-15) (6-15) (3-15)
Fleyr–ÍF	3-2 (0-15) (15-10) (15- 9) (13-15) (15-11)
Mjølnir 2–Fram	0-3 (3-15) (2-15) (4-15)
Mjølnir 1–Fleyr	2-3 (15-12) (9-15) (15-12) (4-15) (13-15)

Støðan

	Dystir	Vunnið	Tapt	Settmunur	Stig
Fleyr	5	5	0	15- 5	10
Fram	5	4	1	13 -6	8
Mjølnir 1 (FM)	4	2	2	10- 7	4
ÍF	4	2	2	6- 7	4
Mjølnir 2 (U)	5	1	4	4-12	2
SÍ	5	0	5	1-15	0

1. deild kvinnur:

Úrslit:

Fleyr B–TB B	3–0
Nøvan–ÍF	0–3

Støðan:

	Dystir	Vunnið	Tapt	Settmunur	Stig
Fleyr B	2	2	0	6-0	4
TB B	3	2	1	6-4	4
ÍF	1	1	0	3-0	2
B68	1	0	1	1-3	0
Nøvan	3	0	3	0-9	0

1. deild menn:

Úrslit:

Nøvn 1–ÍF 2	0–3
Mjølnir 3–Fram 2	0–3

Støðan:

	Dystir	Vunnið	Tapt	Settmunur	Stig
ÍF 2	3	3	0	9-0	6
Fram 2	2	2	0	6-1	4
Nøvan 1	2	1	1	3-3	2
Fleyr 2	1	0	1	0-3	0
Mjølnir 3	2	0	2	1-6	0
Nøvan 2	2	0	2	0-6	0

2. deild kvinnur, Bólkur A:

Úrslit:

Mjølnir C–Nøvan A	3–2
Fleyr C–TB C	0–3

Støðan:

	Dystir	Vunnið	Tapt	Settmunur	Stig
TB C	4	4	0	12-0	8
Mjølnir C	2	2	0	6-2	4
Fleyr C	3	2	1	6-3	4
Nøvan B	2	0	2	0-6	0
Dráttur B	2	0	2	0-6	0
Nøvan A	3	0	3	2-9	0

Tjóðveldisvalevnini í Klaksvík

Uppstillað til Býráðsvalið í Klaksvík.

Jógvan Kári Hansen, Karsten Hansen, Heini Heinesen, Jorun Høgnesen, Andrea Løve Jacobsen, Steinbjørn Jacobsen, Hergerð Joensen, Ólavur Klakk, Jóanes Nielasen, Jón Harald Poulsen

Til skúlanevndina

Heidi Biskopstø, Hanus Bærentsen, Ella Heinesen, Jákup á Fløtti Jacobsen, Poula Joensen, Jorun Johansen, Ninni Olsen, Karl Marius Poulsen, Jógvan Ravnsfjall

Karin Toftegaard, fulltrúi á Oljufyrisitingini:

Oljuvinna setir stór krøv til vinnulívið

JAN MULLER

Herfyri var Karin Toftegaard sett sum nýggjur fulltrúi á Oljufyrisitingini. Hon tekur við eftir Ingibjørt Berg, sum er farin í annað starv.

Uppgávurnar hjá Karin Toftegaard eins og hennara undankvinnu eru fyrst og fremst at taka sær av vinnuligum, útbúgvingarligum og øðrum samfelagsfrøðiligum spurningum í sambandi við útgreinandi arbeiði við atliti til eina møguliga framtíðar oljuvinnu.

Júst ábyrgdarøkið vinnulív og útbúgving er eitt av teimum stóru, tá hugsað verður um at gera okkum klár til eina komandi oljuvinnu.

Sjálv er Karin Toftegaard, sum er útbúgvin sum framleiðsluverkfrøðingur, sera fegin um hesa nýggju avbjóðingina. Hon er 32 ára gomul og hevur tey seinastu árini mest fingist við ráðgevaravirksemi av ymsum slag. Hon hevur arbeitt hjá felagnum „Faroe Fish Consult" og hevur har tikið sær av uppgávum í fiskivinnuni. Men seinastu árini hevur hon eisini arbeitt við mongum øðrum samfelagsmálum, eitt nú innan oljuvinnuna.

Í hesum sambandi kann nevnast, at hon var við til at gera part av arbeiðinum í sambandi við fyrstu føroysku luttøkuna á eini altjóða oljumessu. Hetta var í Aberdeen í fjør.

Góðskustýring

Karin Toftegaard heldur tað er gott, at vinnulívið í Føroyum nú er farið at hugsa um, hvussu tað kann gerast ein partur av tí oljuvinnu, sum stendur fyri stavn.

Í næstum skipar Ídnaðarfelagið fyri framsýning og ráðstevnu, har eisini oljuvinnan verður til umrøðu, og har tað ikki minst fer at verða tosað um týdningin góðskustýring hevur í hesi vinnuni.

Tað er greitt, at hetta við góðskustýring verður meira og meira aktuelt, og hetta er so nakað, sum føroyskt vinnulív – ikki minst við atliti til eina komandi oljuvinnu – í nógv størri mun má laga seg til, skal tað vera við sigur Karin Toftegaard.

Hon vísir á, at krøvini, sum verða sett til júst góðsku (kvalitet), trygd og umhvørvi í eini oljuvinnu, eru so altumráðandi og týdningarmikil, at eisini føroysk virki mugu taka hesi í álvara. Her liggur tí eitt stórt arbeiði og uppgáva hjá vinnulívinum.

Minningarorð um

Hans Juul Danielsen

Tað fyrsta, sum einum rann í huga, tá deyðsboðini bórust um Hans, var eitt orindi úr Jobs bók: „Harrin gav, og Harrin tók, Harrans navn veri lovað. (Job 1.21 b)

Eg kom at kenna Hans fyri trimum mánaðum síðani, tá vit komu at ganga á Bíbliuskúla saman á Børkop. Hans var nógv eldri enn vit øll onnur, tað var ótrúligt, sum samanhaldið virkaði væl, hóast hendan aldursmun. Vit vóru seks føroyingar á skúlanum, og Hans var ein av hesum. Tað fyrsta, sum tú legði merki til við Hans, var hansara unga sinni og vinskap. Tann fyrsta dagin, tá vit skuldu fortelja um okkum sjálvi, kann eg minnast tann vitnisburð, sum Hans bar fram. Hann fortaldi, hvat hann hevði gjørt í sínum lívi. Hann hevði sigIt nógv, og tað hevði ikki altíð verið so fespuligt, men hann kundi takka Harranum fyri, at hann hevði varðveitt seg alla hesa tíð. Hann nevndi eisini, hvussu trúfastur Harrin hevði verið ímóti honum. Ja, um vit so svíkja hann, so svíkur hann ikki okkum, segði hann so rámandi.

Ja, tað var skjótt, at vit komu at kennast. Vit fingu nógvar góðar løtur saman, bæði til gaman og álvara. Hans var ein belisin maður, bæði tá tað galt Bíbliuna og tá vit tosaðu um søgu, ja vit høvdu mangan gleði av tí, sum hann kundi fortelja. Øll vóru góð við Hans, og øll tosaðu við hann og hann við øll.

Eitt sum vit øll upplivdu við Hans, tá vit høvdu undirvísing saman at tá hann segði nakað, so var friður. Hann segði tað altíð so stutt og greitt, so tað var einki at taka feil av. Sum sagt var hann belisin maður og tað kom mangan til sjóndar, tá hann siteraði vers ella onkran persón, sum hevði sagt eitt ella annað, sum var áhugavert.

Stutt innan hann fór herfrá, var hann inni hjá mær, hann var so glaður fyri skúlan og so glaður fyri at vísa dóttrini, sum var komin at vitja, skúlan og hvussu vit búðu. Ja, tað sást og hoyrdist at hann var góður viðkonuna, børnini og familjuna har heima. Hann var okkurt vikuskifti eisini heima hjá verforeldrunum, og tað tosaði hann mangan um, hvussu gott hann føldi seg heima har. Ja, hann setti stóran prís á familju og vinfólk.

Kvøldið fyri sum hann doyði, ringdi hann til mín, vit tosaðu um alt, ja, hann fortaldi, hvussu glaður hann var fyri skúlan og fyri øll. Ikki hugsaði eg, at hetta skuldi vera síðstu ferð eg tosaði við hann, ja, so óskiljandi og ófatuligt, hvat skal ein siga?

Hans er ikki meir her, men minnini eftir hann eiga vit, og tey kunna vit gleðast um. Men eitt sum vit kunna gleðast mest um, og tað er, at hann átti Jesus í sínum hjarta. Ja, hvat er tað, sum er avgerandi, tá lívið her er endað? Er tað ríkidømi, ognir, æra o.s.v., alt hettar er gott, men tað sum telur í deyðanum, er bert um ein eigur Jesus í sínum hjarta.

Vit lesa í 2. Tim 4.7-8, har Paulus sigur, at nú er tíðin hjá honum komin at enda, og nú hevur hann eitt í væntu, og tað er rættlætiskransurin, sum liggur goymdur til hansara í Himlinum. MEN Paulus sigur víðari – ikki mær eina, men eisini øllum teimum, sum hava elskað opinbering hansara.

Hendan kransin kunna vit øll fáa lut í. Og tað er gleðiligt at vita, at Hans bíðaði eftir hesum rættlætiskransi, við tað at Jesus hevði frelst hann.

Góða Kirstin við familju, okkara orð kunnu siga so lítið í eini tílíkari støðu, men Guds orð og hansara lyftir svítast ei, og tað er tað, sum vit mugu halda okkum til. Má Jesus signa og troysta tykkum í sorgini, men lat okkum líva í vónini, vit skulu siggja hann, og øll tey sum settu sítt álit á Jesus her í lívinum aftur ein dag.

Tú kemur ei uttan um Jesus
Hitt dýrasta navnið, ið er,
Í lívi, í deyða og dómi
Tað einasta navnið, ið ber.

Vit mugu takka Jesusi fyri, at vit kundu fáa loyvi at kenna Hans.

Friður verður við minninum um Hans.

Pól